FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald


Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2026 .... 3

Inngangur .... 16

Lýsing av gongdini í búskapinum .... 17

*Roknast kann við størri ískoyti til vøksturin frá útflutningsvinnunum í 2025 og 2026* .... 20
*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum* .... 22
*Eftirspurningur og brúkaraprísir* .... 24
*Gongdin í til- og fráflyting* .... 26
*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni* .... 29

*Heimsbúskapurin* .... *30*

*Almenn fíggjarmál* .... *32*



Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

Løgtingið

**Tórshavn**, 31. mars 2025
Mál nr.: 25/06702

**Uppskot**
**til**
**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2026**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin í løgtingsfíggjarlógini fyri 2026 verður 7.886 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 7.236 mió. kr., og løgukarmurin verður 650 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 7.634 mió. kr. Framskrivaða úrslitið í løgtingsfíggjarlógini fyri 2026 er hall á 252 mió. kr.; tá er innroknað, at um 100 mió. kr. eru fluttar netto í Búskapargrunnin. Framskrivaðu játtanarkarmarnir fyri 2026 vísa, at neyðugt verður við átøkum, serstakliga á útreiðslusíðuni. Átøk verða gjørd fyri 55 mió. kr. í 2026. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2026 býttir á greinar.

| **Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2026** | | |
|---|---|---|
| ***Mió. kr.*** | **Rakstur** | **Løgur** |
| § 1 Løgtingið | 92,7 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 48,5 | 108,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 466,6 | 50,6 |
| § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál | 522,8 | 169,9 |
| § 6 Uttanríkis- og vinnumál | 209,4 | 0,0 |
| § 7 Barna- og útbúgvingarmál | 1.497,4 | 115,0 |
| § 11 Heilsumál | 1.776,2 | 86,3 |
| § 12 Almanna- og mentamál | 2.489,6 | 118,2 |
| § 14 Lógarmál | 57,7 | 0,0 |
| § 18 Umhvørvismál | 75,1 | 2,0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **7.236,0** | **650,0** |
| **Útreiðslukarmur** | **7.886,0** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **7.634,0** | |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | **-252,0** | |
| **Átøk at betra úrslitið** | **55,0** | |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | **-197,0** | |

**Viðmerkingar**
Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur við hesum vegna landsstýrið fram uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2026.

Við játtanarkørmunum, ið sambært § 8, stk. 1 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan skulu verða lagdir fram innan 1. apríl, ásetir Løgtingið yvirskipaða fíggjarpolitiska karmin fyri komandi árið. Játtanarkarmarnir eru avgerandi fyri, hvussu stórt fíggjarliga rásarúmið verður komandi ár.

Endamálið við framskrivaðu játtanarkørmunum fyri 2026-2030 er, at framskrivingarnar vísa mettu gongdina í útreiðslum og inntøkum landsins næstu 5 árini við galdandi lóggávu og verandi virksemisstigi.

Broytta fólkasamansetingin við fleiri eldri fólkum leggur trýst á almennu kassarnar. Stóru árgangirnir, sum eru føddir eftir seinna heimsbardaga og fram til 60'ini, eru teir, sum komandi árini leggja trýst á heilsuverkið og útreiðslurnar til fólkapensjón. Tær útreiðslurnar vaksa skjótari nú og komandi árini, enn tær gjørdu fyri fáum árum síðani.

Framskrivingar fyri 2026 til 2030 vísa, at landskassin uttan átøk fer at hava hall øll árini fram til og við 2030.

Neyðugt er tí at tillaga almenna raksturin fyri at loysa haldførisavbjóðingina. Í 2026 ætlar landsstýrið at fremja átøk fyri um 55 mió. kr. fyri at halda fíggjarpolitiska tilmælið um, at raksturin ikki skal vaksa meira enn 4% í 2026. Árini frameftir skulu átøk fremjast fyri umleið 0,5% av rakstrinum. Tað skal betra javnvágina millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum. Aftaná átøk verður roknað við avlopi í 2028.

Í 2026 er nettoflytingin í Búskapargrunnin góðar 100 mió. kr. Tað ger hallið størri í 2026. Úrslitið betrast so hvørt, at nettoflytingin í Búskapargrunnin verður minni komandi árini.

Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar gerast næstu árini, verður tí neyðugt at økja um átøkini samsvarandi.

**Framskrivingarfortreytir**
Niðanfyri verður greitt frá fortreytunum fyri ymisku framskrivingunum.

**Rakstrarjáttanir, stuðulsjáttanir og lógarbundnar játtanir**
***Lønarframskrivingar***
Framskrivað verður fyri lønarhækkingar í 2026. Eingin almennur lønarsáttmáli gongur inn í 2026, men sáttmáli er gjørdur á privata arbeiðsmarknaðinum, sum gongur fram til 30. apríl 2026 við lønarhækkeking á 3,87%. Lønarhækkingin á almenna arbeiðsmarknaðinum frá 1. oktober 2025 fer helst at líkjast hesum. Fyri níggju mánaða tíðarskeiðið fram til 30. september 2026 verður lønarhækkingin mett til 3,5%. Mett verður, at lønarhækkingin frá 1. oktober 2026 fer at lækka aftur, og verður ásett til 2,5%. Framskrivað verður vigað við 3,25% í 2026.

Fyri ávísar játtanir, har ið serstøk lønarviðurskifti gera seg galdandi, verður framskrivað fyri hesum, so sum sáttmálasett ístaðin fyri tænastumenn.

***Prísvøkstur***
Meginreglan er, at prísvøkstur ikki verður framskrivaður, men tó verður hetta gjørt fyri ávísar játtanir, har ið stórur prísvøkstur vanliga er.

***Javning av almannaveitingum og lestrarstuðli***
Javningin av almannaveitingum, pensjónum og lestrarstuðuli verður vigað helvt um helvt við lønarvøkstri og prístalsvøkstri árið undan fram til 1. oktober. Er lønarvøksturin lægri enn prístalsvøksturin, verður bara javnað við lønarvøkstrinum. Javningarprosentið fyri 2026 verður ásett í kunngerð, men verður mett til 3,38%, sum er vigað við 4,75% í kendum lønarvøkstri og 2% í mettum prísvøkstri, sum er á sama støði sum miðal prísvøksturin í 2024.

***Ársins prísir 2026, men fastir (realir) prísir 2027-2030***
Sum vanligt er í játtanarkørmunum, verður framskrivað í ársins prísum í 2026, men árini 2027-2030 verður framskrivað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2027 til 2030 verður ongin lønar- ella prísvøkstur íroknaður.

***Bundnar raðfestingar***
Nýtt ella broytt virksemi verður sum meginregla játtað fyri fult ár, tá ið tað byrjar. Er tó talan um virksemi, sum ikki er tikið við fyri fult ár í 2025, skal hetta framskrivast til fult ár fyri 2026. Framskrivast skal á sama hátt fyri virksemi, sum broytist stigvíst í tíðarskeiðnum 2026-2030, sum til dømis útrulling av nýggjari útbúgving ella eykaflokkum. Øvugt skal eisini framskrivast fyri virksemi, sum ætlast at enda ella minka í vavi í tíðarskeiðnum 2026-2030.

***Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting***
Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hava við sær, at neyðugt er at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum fyri at verandi virksemisstig verður varðveitt.

***Rentustøði og oljuprísur***
Játtanarkarmarnir eru gjørdir við verandi rentustøði og oljuprísi. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið og oljuprísurin kunnu broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentustuðul, og útreiðslur til olju eisini broytast.

***Fólkavøkstur, broytt fólkasamanseting og aðrar virksemisbroytingar***
Í mun til galdandi lóggávu verður framskrivað fyri virksemisbroytingar vegna til dømis fólkavøkstur og broytta fólkasamanseting, og fyri metingar av útreiðslugongdini út frá kendum viðurskiftum, sum hava við sær virksemisbroytingar.

***Stuðulsjáttanir***
Meginreglan er, at stuðulsjáttanir verða framskrivaðar við óbroyttari upphædd, uttan so, at serstøk viðurskifti gera seg galdandi, so sum uppathaldandi virksemi ella bindandi avtala um stuðulshækking, um tað so er eingangs ella varandi.

**Talva: Útvaldar játtanir við størstum rakstrarvøkstri fyri 2025-2030**

| *Mió. kr.* | **FL2025** | **JK2026** | ***2027*** | ***2028*** | ***2029*** | ***2030*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§18: | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | *178,0* | *186,2* | *188,7* | *190,7* | *192,7* | *194,2* |
| Rentustuðul | *72,5* | *73,5* | *73,5* | *73,5* | *73,5* | *73,5* |
| Strandfaraskip landsins | *231,0* | *237,1* | *234,6* | *234,6* | *234,6* | *234,6* |
| Fólkaskúlin | *487,6* | 510,7 | 513,2 | 515,9 | 517,4 | 518,9 |
| Fróðskaparsetur Føroya | *163,0* | 166,6 | 166,6 | 166,6 | 166,6 | 166,6 |
| Lestrarstuðul | *137,9* | *145,9* | *148,4* | *148,4* | *148,4* | *148,4* |
| Heilsutrygdarveitingar | *297,7* | *315,3* | *331,4* | *348,4* | *366,3* | *385,0* |
| Landssjúkrahúsið | *1.012,8* | 1.047,7 | 1.059,1 | 1.071,0 | 1.083,3 | 1.095,9 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | *73,5* | 72,0 | 74,5 | 77,1 | 79,8 | 82,6 |
| Trivnaðartænastur | *495,3* | 520,7 | 526,8 | 533,2 | 539,8 | 546,6 |
| Arbeiðsfremjandi tiltøk | *176,7* | 190,5 | 197,6 | 201,8 | 207,5 | 213,2 |
| Fólkapensjón | *745,8* | 768,3 | 785,9 | 805,5 | 827,2 | 848,5 |
| Fyritíðarpensjón | *340,5* | 379,7 | 394,7 | 409,8 | 424,9 | 440,0 |
| **Útvaldar rakstrarútreiðslur tilsama** | ***4.412,3*** | ***4.614,0*** | ***4.695,1*** | ***4.776,5*** | ***4.861,9*** | ***4.947,8*** |
| Lutfall (útvaldar/rakstur tilsamans) | 64% | 64% | 64% | 65% | 65% | 65% |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***6.909,3*** | ***7.236,0*** | ***7.314,4*** | ***7.384,8*** | ***7.467,5*** | ***7.561,8*** |

***Tænastumannaeftirlønir***
Framskrivað er fyri mettari lønarhækking í 2026 og árligari nettotilgongd av tænastumonnum, sum fara frá fyri aldur. Størsta tilgongdin síðstu árini hevur verið lærarar, men tann tilgongdin er minkandi, tí lærarar síðani 1998 ikki eru settir sum tænastumenn.

***Stuðul til rentuútreiðslur***
Rentustøðið er hækkað nógv síðstu árini. Útreiðslur landskassans til stuðul til rentuútreiðslur eru vaksnar úr 44 mió. kr. í 2021 upp í 86 mió. kr. í 2024. Rentustøðið lækkaði í 2024 og eisini higartil í 2025. Útlit eru til, at rentustøðið lækkar nakað afturat, nú prísvøksturin aftur er komin niður á eitt lágt støði, tó eru óvissur um handilsstríð millum USA og Evropa. Framskrivað er við, at metta miðalrentustøðið í 2025 verður óbroytt í 2026 og frameftir.

***Strandfaraskip Landsins***
Lagt er upp fyri, at oljuprísurin er á sama støði sum í 2025, umframt lønarhækkingar. Framskrivað er við príshækkingum samsvarandi sáttmálanum um útveiting av Bygdaleiðum.

***Fólkaskúlin***
Játtanin til fólkaskúlan er í størstan mun læraralønir. Framskrivað er við hægri útreiðslum, sum stava frá, at sáttmálasettir lærarar verða settir í staðin fyri tænastumenn.

***Fróðskaparsetur Føroya***
Framskrivað er fyri mettari lønarhækking í 2026.

*Lestrarstuðul*
Játtanin er framskrivað í sambandi við økt virksemi á Heilsuskúla Føroya, har skipan við løn undir útbúgving verður byrjað. Framskrivað er við, at lestrarstuðulin verður javnaður við 3,38% í 2026.

*Heilsutrygdarveitingar*
Í mun til nýtsluna í 2024 er framskrivað við útreiðsluvøkstri á um 7,5% í 2025 og í 2026. Síðani við 5,5% í føstum prísum frá 2027 til 2030. Framskrivingin er vegna fult virksemi í eini nýggjari kommunulæknaviðtalu, og annars vegna fólkavøkstur og broytingar í fólkasamanseting.

*Landssjúkrahúsið*
Framskrivað er við útreiðsluvøkstri á 0,5% vegna fólkavøkstur, við prísvøkstri á 2%, umframt at serviðgerð uttanlands, flutningur og uppihald, og sjúklingahotellið Tórshavn eru framskrivað við 5% í 2026. Síðani við 3,5% í føstum prísum frá 2027 til 2030. Framskrivað er fyri fult ár fyri virksemi byrjað í H-bygninginum í 2025. Frameftir er roknað við, at verandi virksemi stigvíst verður flutt inn í H-bygningin, men ikki við øktum virksemi.

*Serstakur sjúkrahúsheilivágur*
Í mun til nýtsluna í 2024 er framskrivað við útreiðsluvøkstri á 5% í 2025 og í 2026, síðani við 3,5% í føstum prísum frá 2027 til 2030.

*Trivnaðartænastur*
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av tungum brúkarum. Framskrivað er við, at nýggjur búfelagsskapur á Toftum verður fult tikin við í 2026.

*Arbeiðsfremjandi tiltøk*
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av brúkarum í skipanini. Veitingarnar eru framskrivaðar við lønarhækking hjá arbeiðarafeløgunum í 2025. Framskrivað er eisini við, at kravda pensjónsgjaldið hækkar 1%-stig árliga fram til 2026, tá komið er upp á 12%.

*Fólkapensjón*
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 3,38% í 2026.

*Fyritíðarpensjón*
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Nettotilgongdin er vaksin vegna tað, at eftirlønaraldurin er hækkaður upp í 67 og eitt hálvt ár. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 3,38% í 2026.

**Løgujáttanir**
***Løgukarmur***
Fyri samtyktar løguverkætlanir verður framskrivað sambært útreiðsluætlanini, soleiðis sum hon er tikin við í verklagslógina, viðmerkingarnar til verklagslóg og viðmerkingarnar til løgujáttanina í fíggjarlógini fyri 2025. Aðrar verkætlanir verða framskrivaðar sambært løguætlanini hjá landinum.

Løgurnar verða framskrivaðar við føstum árligum karmi fyri allar løguverkætlanirnar á tilsamans 650 mió. kr. fyri árini 2026-2030.

KT-verkætlanir og stuðul til løguverkætlanir hjá kommunum verða tiknar við sum løgujáttanir. Eisini eru í løgukarminum innroknaðar løgukendar útreiðslur, so sum partapeningur í feløg, sum fremja størri samferðsluverkætlanir og løgustuðul til sjálvsognarstovnar.

| **Talva: Løgukarmur fyri 2025-2030** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | ***FL2025*** | **JK2026** | **2027** | **2028** | **2029** | **2030** |
| **Løguútreiðslur tilsamans*** | ***618,5*** | **650,0** | **650,0** | **650,0** | **650,0** | **650,0** |

*Løgujáttanir umframt løgukendar útreiðslur

***Løgtingsbygningurin***
Arbeitt verður við fyrireiking og prosjektering av neyðugari umvæling av klædninginum á Løgtingsbygninginum. Enn er óvist nær arbeiðið kann fara í gongd, og hvat kostnaðurin verður.

***Suðuroyartunnilin og tilhoyrandi verkætlanir***
Uppskot til heimildarlóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi verkætlanum er lagt fyri Løgtingið (LM-072/2024). Við henni fær felagið heimild til at prosjektera og bjóða verkætlanirnar út, men nýggj lóg skal verða samtykt fyri at kunna taka av tilboðunum. Í fíggjarlógini fyri 2025 eru 100 mió. kr. settar av til partapening. Ætlanin er at seta 100 mió. kr. av um árið til og við 2034, tilsamans 1 mia. kr. Eisini skal Íleggingargrunnurin læna felagnum 350 mió. kr. Tá ið verkætlanirnar eru lidnar, skal játtanin til Suðuroyarleiðina hjá Strandferðsluni verða latin sum árligur stuðul til felagið.

***Talgildu Føroyar 2.0***
Verkætlanin Talgildu Føroyar snúði seg um skipanir sum t.d. Heldina, Samleikan og Vangan og varð liðug í 2023. Samstundis varð sjøtul settur á 2. umfar av verkætlanini við tí fyri eyga at fáa størri nyttu og gagnnýtslu av talgilda undirstøðukervinum. Uppskot um verklagslóg um Talgildu Føroyar 2.0 er lagt fyri Løgtingið (LM-082/2024). Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 66 mió. kr. (íroknað óvissu og prísvøkstur), harav 45 mió. kr. fyri landskassan. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í 2027.

***Heildarætlan fyri Kjarnuna (nýggj skattaskipan)***
Heildarætlanin fyri Kjarnuna verður framd við heimild í verklagslóg frá 2024. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 150 mió. kr. (íroknað óvissu og prísvøkstur). Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í 2029.

***Umvæling av almennum bygningum***
Játtanin verður brúkt til umvælingar og størri viðlíkahald av almennum bygningum og til at leggja um til varandi orku. Bygningarnir fevna um einar 250 tús. fermetrar. Fleiri bygningar eru ikki í nøktandi standi, og nógvir eru illa bjálvaðir, soleiðis at orkunýtslan er óneyðuga stór. Mett verður, at eftirsleipið til at umvæla og viðlíkahalda bygningarnar er umleið 470 mió. kr. Í fíggjarlógini fyri 2025 eru árliga 29 mió. kr. settar av til umvælingar og 7,5 mió. kr. til grønar orkuloysnir árini 2025-2027.

***Nýggir landsvegir***
Játtanin verður brúkt til at útbyggja og bøta um vegakervið. Vegur og tunnil til Tjørnuvíkar eru liðugt prosjekteraðir, og prosjekteringin av at umvæla brúnna um Streymin er komin væl áleiðis. Mett verður, at eftirsleipið at umvæla og dagføra vegir, tunlar, brýr o.a. er umleið 420

mió. kr. Í fíggjarlógini fyri 2025 eru fyri árini 2025-2027 settar av góðar 210 mió. kr. til landsvegirnar. Av hesum eru 12 mió. kr. árliga til asfaltering.

***Strandfaraskip landsins***
Játtanin verður brúkt til at byggja nýggj skip, dokking hjá Smyrli, størri umvælingar o.tíl. Tvær ferjur eru liðugt prosjekteraðar. Ætlanin er at fara undir at byggja ferjuna til Kalsoyarleiðina í 2025. Endurnýggjanin av ferjuflotanum fevnir um fýra ferjur. Mett verður, at tørvur verður á um 470 mió. kr. í 2026 og nøkur ár fram. Umframt koma dokking og umvæling av verandi ferjum.

***Fróðskaparsetrið (skúlabygningar og felagsbygningur)***
Verkætlanin snýr seg um skúlabygningarnar á Frælsinum og at gera ein nýggjan felagsbygning. Ein verklagslóg er um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar fyri í mesta lagi 37 mió. kr. Uppskot um at broyta lógina er lagt fyri Løgtingið um at hækka útreiðslurnar við 2 mió. kr.; umframt skulu 7,3 mió. kr. brúkast til at prosjektera heildarætlanina fyri skúlabygningarnar (LM-079/2024). Harafturat er ein verklagslóg um at prosjektera felagsbygningin fyri í mesta lagi 31 mió. kr. (Ll. nr. 57 frá 29. mai 2024). Arbeitt verður við einari heildarætlan fyri bygningarnar. Í fíggjarlógini fyri 2025 eru umleið 250 mió. kr. settar av til alla verkætlanina árini 2025-2027.

***Talgild Heilsuskipan***
Veitarin av talgildu heilsuskipanini hevur sagt avtaluna upp. Skipanin verður ikki dagførd longur, og eftir 2028 verða tænastur ikki veittar longur (support). Nýggj talgild heilsuskipan skal tí útvegast uttan drál. Í fíggjarlógini fyri 2025 er átekning um at brúka 15 mió. kr. til at kravfesta og fyrireika verkætlanina. Samlaðu útreiðslurnar verða mettar til umleið 200 mió. kr.

***Bústovnar***
Játtanin verður brúkt til at byggja nýggjar bústovnar. Í løtuni verða tveir bústovnar fyrireikaðir. Ætlanin er at fara undir at byggja sambýli á Argjum tíðliga í 2026 og sambýli í Miðvági seinni sama ár. Ætlanin er eisini at fara undir at fyrireika út- og umbygging av Eirargarði. Umframt heldur dagføring av verandi bústovnum fram. Í fíggjarlógini verða játtaðar árliga umleið 50 mió. kr. til bústovnar.

**Løguætlan**
Eitt tilmæli frá Fíggjarmálaráðnum í sambandi við fíggjarpolitiskt regluverk snýr seg um løguætlanina hjá landinum.

Afturvendandi avbjóðingar ella ivamál eru við at seta løguverkætlanir hjá landinum í gongd, m.a. tí at tær verða viðgjørdar einsæris og til tíðir ikki verða mettar í mun til, hvørjar verkætlanir eru mest neyðugar ella geva mest nyttu til samfelagið.

Løguverkætlanir hjá landinum eiga at verða viðgjørdar í einari samlaðari løguætlan fyri at tryggja eina so góða langtíðarætlan og samskipan av verkætlanunum sum møguligt. Ein løguætlan skal fevna um 10 ár ella meira og eigur at verða grundað á fakligar metingar um kostnað, nyttu og neyðugleika av hvørjari verkætlan.

Ein leistur at gera eina samlaða meting av einari verkætlan er at nýta eina fleirstigaða greining (multifactor analysis) sum amboð. Atlitini, sum skulu samantvinnast í einari slíkari greining, kunnu vera tey samfelagsligu, búskaparligu og umhvørvisligu atlitini.

Ætlanin er at skipa eina breiða politiska tilgongd fyri at gera eina løguætlan, sum røkkur yvir 10 ár ella meira. Uppskot til samtyktar verður síðani lagt fyri Løgtingið.

***Fyritreytir fyri inntøkujáttanum og rentum***
Inntøkurnar verða framskrivaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar. Fyri ávísar inntøkujáttanir verður í framskrivingunum lagt upp fyri serligum viðurskiftum í einstøkum vinnugreinum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum, og sum í stóran mun fylgja vøkstrinum í BTÚ.

***Ársins inntøkuvøkstur 2026, men fastur (realur) inntøkuvøkstur 2027-2030***
Sum vanligt er í játtanarkørmunum, verður framskrivað í ársins prísum í 2026, men árini 2027-2030 verður framskrivað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2027 til 2030 verður framskrivað við mettum realum inntøkuvøkstri.

***Rentustøði***
Fyritreytirnar fyri rentuframskrivingunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdina. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið kann broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentuútreiðslur av skuldini eisini broytast.

**Talva: Útvaldar játtanir við størstum inntøkuvøkstri fyri 2025-2030**

| *Mió. kr.* | **FL2025** | **JK2026** | **2027** | **2028** | **2029** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Vanligur landsskattur | *2.140,0* | *2.270,0* | *2.315,0* | *2.360,0* | *2.410,0* | *2.460,0* |
| Felagsskattur | *550,0* | *555,0* | *560,0* | *565,0* | *570,0* | *575,0* |
| Kapitalvinningsskattur | *400,0* | *410,0* | *415,0* | *420,0* | *425,0* | *430,0* |
| Meirvirðisgjald | *2.180,0* | *2.270,0* | *2.320,0* | *2.370,0* | *2.420,0* | *2.470,0* |
| Loyvisgjald á alivinnu | *293,1* | *315,0* | *335,0* | *350,0* | *355,0* | *365,0* |
| Avgjald á fiskatilfeingi | *457,8* | *460,0* | *475,0* | *485,0* | *485,0* | *465,0* |
| Útluting frá alm. partaf. og grunnum | *157,0* | *130,0* | *130,0* | *130,0* | *130,0* | *130,0* |
| Heildarveiting | *566,8* | *541,8* | *541,8* | *541,8* | *541,8* | *541,8* |
| **Útvaldar inntøkur tilsamans** | ***6.744,7*** | **6.951,8** | **7.091,8** | **7.221,8** | **7.336,8** | **7.436,8** |
| Lutfall (útvaldar/inntøkur tilsamans) | *91%* | 91% | 91% | 91% | 91% | 91% |
| **Inntøkur tilsamans** | ***7.407,4*** | ***7.634,0*** | ***7.787,4*** | ***7.934,4*** | ***8.058,5*** | ***8.168,5*** |

Størstu inntøkukeldurnar hjá landinum eru vanligi landsskatturin og meirvirðisgjaldið, sum tilsamans eru um 60% av samlaðu inntøkunum hjá landskassanum.

***Vanligur landsskattur***
Í mun til mettu skattainntøkurnar fyri 2025 er framskrivað við vøkstri á um 4,5% í 2026. Árini 2027 til 2030 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2%.

***Felagsskattur***
Roknað verður við varisligum vøkstri í felagsskattinum næstu árini.

***Kapitalvinningsskattur***
Roknað verður við varisligum vøkstri í kapitalvinningsskattinum næstu árini.

***Meirvirðisgjald***

Viðvíkjandi meirvirðisgjaldinum er roknað við vøkstri á um 4,5% í 2026 sammett við metingina í løgtingsfíggjarlógini fyri 2025. Árini 2027 til 2030 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2%.

***Loyvisgjald á alivinnu***

Framskrivað er eftir galdandi lóggávu. Roknað verður við, at tøkan kann hækka um 10% í 2025 og nakað tað sama í 2026. Roknað verður ikki við stórum príshækkingum á aldum laksi á heimsmarknaðinum. Í 2026 kemur harafturat eyka skatturin á sjógvaling fyri inntøkuárið 2025, sum er mettur til 80 mió. kr. Meirinntøkan verður javnað í Búskapargrunninum.

***Avgjald á fiskatilfeingi***

Framskrivað er eftir galdandi lóggávu. Óvissa er um avgjaldið á fiskatilfeingi næstu árini, serliga um kvotur og prís á uppsjóvarfiski. Í 2026 og 2027 detta uppboðssølukvoturnar burtur, og avgjøldini hækka í 2026.

Metta inntøkan í 2026 er 65 mió. kr. hægri enn í 2025. Hetta kemst serliga av, at avgjaldið á makrel hækkar munandi í summar, tí prísirnir síðsta árið hava verið serliga høgir. Makrelurin, sum verður fiskaður í bretskum sjógvi fyrst í 2026, rindar tí hægri veiðigjald í 2026 enn í 2025. Meirinntøkan verður javnað í Búskapargrunninum.

***Útluting frá almennum feløgum og grunnum***

Roknað verður við vinningsbýti frá feløgum og grunnum sum landið eigur heilt ella partar av. Hesi eru millum annað Føroya Banki, Føroya Tele, Atlantsflog, Smyril-Line, Elektron og Realurin. Mett verður, at útlutingin frá Føroya Banka verður lægri í 2026 enn í 2025.

***Heildarveitingin***

Avtalað er við donsku stjórnina, at heildarveitingin lækkar 25 mió. kr. árliga til og við 2026, tá upphæddin verður 542 mió. kr.

***Demografiskar broytingar***

Sambært framskrivaðu játtanarkørmunum er næstan allur rakstrarvøksturin komandi fimm árini innan almanna og -heilsuøkið. Høvuðsorsøkin er broytta fólkasamansetingin, sum hevur við sær vaksandi tal av eldri fólki.

Broytingarnar síggjast serliga nú og komandi árini, tá ið stóru árgangirnir, sum eru føddir í 1950'unum, koma inn í ellisárini. Talið av fólki yvir 80 ár er fram til 2020 vaksið við 30-40 fólkum um árið. Hetta talið er nú vaksið til um 100 fólk um árið, sum serliga leggur størri trýst á heilsuverkið næstu árini.

Talið av fólkapensjónistum er eisini vaksandi og gevur størri útreiðslur til fólkapensjón. Síðstu fimm árini hevur harafturat verið møguligt at útseta fólkapensjónina, sum gevur eitt hægri útgjald seinni. Hendan møguleika hava fleiri brúkt, og tað hevur lutvíst útsett part av landsins útreiðslum til fólkapensjónir. Hendan skyldan byrjar nú at síggjast og er ein orsøk til, at framroknaðu útreiðslurnar til fólkapensjónir vaksa næstu árini.

## Átøk at betra úrslitið

Fíggjarmálaráðið mælir til, at rakstrarútreiðslurnar hjá landinum hækka í mesta lagi um 4% í 2026. Við hesum verður vøksturin í útreiðslunum hjá landinum nakað lægri enn samlaði væntaði vøksturin í BTÚ (í ársins prísum).

Framskrivingin av útreiðslunum fyri 2026 vísir ein vøkstur á 4,7% í mun til samtyktu fíggjarlógina fyri 2025. Útreiðsluvøksturin hjá landinum fevnir um lønarhækkingar, hægri veitingar og virksemisøkingar (demografiskar broytingar og fólkavøkstur).

Átøk at tálma útreiðsluvøksturin eiga at fremjast í 2026 fyri 55 mió. kr.

Frameftir verður skotið upp at fremja átøk fyri 35 mió. kr. árliga, sum áleið svara til eina árliga lækking á 0,5% av rakstrarútreiðslunum.

Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar koma afturat næstu árini, verður neyðugt at fremja samsvarandi eyka átøk.

Harafturat kunnu átøk at økja um inntøkurnar verða framd fyri at betra um úrslit landskassans og eisini haldførisavbjóðingina.

**Fíggjarpolitiskt regluverk**
Í samsvari við samgonguskjalið er sjóneykan sett á at taka miðvís stig til at røkka einari langtíðarjavnvág í almenna búskapinum. Málið er at tryggja búskaparliga haldførið og gera langtíðar rakstrar- og løguætlanir.

Fíggjarmálaráðið hevur arbeitt við at lýsa ymiskar møguleikar í mun til føroysk viðurskifti, og hvat letur seg best gera. Fíggjarmálaráðið mælir til eina røð av átøkum. Tey hava trý yvirskipað endamál:

- At betra um avgerðir hjá politisku skipanini
- At útvega viðkomandi upplýsingar um búskaparligu støðuna nú og frameftir
- At skipa eftirlit við teimum avgerðum, sum verða tiknar

Onkur tilmæli eru sett í verk ella eru virkin. Ætlanin er at hava eina breiða politiska viðgerð av tilmælunum um átøk, sum eiga at verða sett í verk.

Fíggjarmálaráðið hevur mælt til hesi átøk:

1. Skiftandi tilfeingisinntøkur og serligar inntøkur í Búskapargrunn
2. Roknskaparligar og játtanarligar meginreglur
3. Hámark fyri útreiðsluvøkstri
4. Hámark fyri útreiðsluvøkstri – umsiting og eftirlit
5. Uppskot til lógir, kunngerðir o.a. betur lýst við fíggjarligum avleiðingum
6. Løguætlan og nyttumetingar (samfelagsliga, búskaparliga og umhvørvisliga)
7. Avmarkingar og/ella tilmæli um lántøku
8. Játtanarkarmar fyri longri tíðarskeið (t.d. 10 ár)
9. Konjunkturjavnað úrslit (bygnaðarligt úrslit)
10. Ikki bygnaðarligt hall yvir eitt áramál
11. Haldførisávísi (stutt-, miðal- og langtíðarstrekki)
12. Framrokning av almanna- og heilsuútreiðslum
13. Fyrisitingarlig grannskoðan

Lógin um Búskapargrunnin er broytt (nr. 1), og landsstýrið ásetir ein mesta útreiðsluvøkstur fyri fíggjarlógina; tó er arbeiðið ikki regluskipað (nr. 3). Nevnast kann eisini, at Búskaparráðið

metir um haldførið (nr. 11), og at almanna- og heilsuútreiðslurnar verða framroknaðar (nr. 12). Tað arbeiðið eigur eisini at verða regluskipað.

Fíggjarmálaráðið arbeiðir saman við Gjaldstovuni at endurskoða roknskaparligu og játtanarligu reglurnar. Tað snýr seg m.a. um at grunda roknskapin á altjóða standardar, at kunna avskriva, flyta avlop/hall fram og at kunna leggja ætlanir fleiri ár fram (nr. 2). Somuleiðis verður arbeitt saman við Landsbankanum/Búskaparráðnum um at gera upp bygnaðarliga úrslitið (nr. 9).

Um løguætlanina (nr. 6) verður víst til brotið omanfyri.

Ein týðandi lutur í regluverkinum er at skipa eitt hóskandi eftirlit við og eitt rúm fyri óheftum metingum av fíggjarlógini og ætlanunum hjá landsstýrinum. Tað snýr seg um at meta um haldførið, gera tilmæli um lántøku, áseta ella meta um útreiðsluhámark og helst eisini um dygdina í fíggjarlógini. Fíggjarmálaráðið heldur, at Búskaparráðið eigur ein stóran lut í tílíkum uppgávum sum eitt slag av varðhundi. Eisini kunnu ávísar uppgávur liggja hjá grannskoðanini, t.d. játtanareftirlit í mun til útreiðsluvøkstur, og at fyrisitingarlig grannskoðan kann verða víðkað og skipað betur. Við tíðini eigur allur almenni geirin at koma undir regluverkið.

**Uppskot til játtanarkarmar 2026-2030**
Uppskotið til játtanarkarmar byggir á fíggjarlógina fyri 2025, umframt politisk átøk, sum eru gjørd síðani. Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2026 til 2030 útgreinað og býtt á greinar og ár.

**Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2026-2030**

| *Mió. kr.* | **FL2025** | **JK2026** | **2027** | **2028** | **2029** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§18: | | | | | | |
| § 1 Løgtingið | 89,9 | 92,7 | 95,6 | 93,1 | 93,6 | 94,1 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 48,4 | 48,5 | 53,4 | 48,4 | 49,0 | 49,5 |
| § 3 Fíggjarmál | 445,4 | 466,6 | 468,5 | 473,5 | 472,5 | 474,0 |
| § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál | 508,1 | 522,8 | 511,8 | 511,8 | 511,8 | 513,8 |
| § 6 Uttanríkis- og vinnumál | 203,3 | 209,4 | 209,4 | 208,8 | 208,4 | 208,4 |
| § 7 Barna- og útbúgvingarmál | 1.414,6 | 1.497,4 | 1.497,3 | 1.501,7 | 1.501,1 | 1.502,6 |
| § 11 Heilsumál | 1.709,6 | 1.776,2 | 1.807,9 | 1.840,9 | 1.875,2 | 1.910,9 |
| § 12 Almanna- og mentamál | 2.364,9 | 2.489,6 | 2.539,0 | 2.575,1 | 2.624,3 | 2.674,8 |
| § 14 Lógarmál | 52,5 | 57,7 | 56,4 | 56,4 | 56,4 | 58,6 |
| § 18 Umhvørvismál | 72,5 | 75,1 | 75,1 | 75,1 | 75,1 | 75,1 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **6.909,3** | **7.236,0** | **7.314,4** | **7.384,8** | **7.467,5** | **7.561,8** |
| **Løguútreiðslur, §1-§18*** | **618,5** | **650,0** | **650,0** | **650,0** | **650,0** | **650,0** |
| **Inntøkur** | **7.407,4** | **7.634,0** | **7.787,4** | **7.934,4** | **8.058,5** | **8.168,5** |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | **-120,4** | **-252,0** | **-177,0** | **-100,5** | **-59,1** | **-43,4** |
| **Átøk at betra úrslitið** | | **55,0** | **90,0** | **125,0** | **160,0** | **195,0** |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | | **-197,0** | **-87,0** | **24,6** | **101,0** | **151,7** |

**Viðm:** Tølini fyri 2025 og 2026 eru í ársins prísum, og tølini fyri 2027-2030 eru í føstum prísum. Tað vil siga, at lønar- og prísvøkstur er ikki íroknaður, hvørki á útreiðslu- ella inntøkusíðu landskassans. Tølini fyri 2025 eru sambært samtyktu fíggjarlógini.
* Í løgukørmunum eru innroknaðar løgukendar útreiðslur.

**Skjal hjálagt**
Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I, mars 2025

Fíggjarmálaráðið, 31. mars 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/Bjarni Askham Bjarnason

## Inngangur

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2026 byggir í høvuðsheitum á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2025 (løgtingsmál nr. 11/2024). Dagførdar framskrivingar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, síðani av altjóða búskapinum og at enda av almenna búskapinum.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Fíggjarmálaráðið metir, at vøksturin verður nakað lægri í 2025 og 2026, sammett við árini 2021 til 2023, men tó hægri enn mett fyri 2024. Óvissan um útlitini fyri tey næstu 1-2 árini er sum heild vaksin síðstu mánaðirnar, serliga tí at møguliga verður handilsstríð og hægri tollmúrar millum stórveldini næstu árini. Hagtøl vísa, at stórur vøkstur var í búskapinum í 2023, men at vøksturin minkaði í 2024. Mynd 1 niðanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) árini 2005 til 2023 og metingar fyri árini 2024 til 2026.

**Mynd 1| Bruttotjóðarúrtøka, broyting í % um árið, ársins prísir og fastir 2010-prísir, 2005-2026**




Viðm.: Tølini fyri 2024 til 2026 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Føroyski tjóðarroknskapurin er gjørdur upp til og við 2023. Metti vøksturin í búskapinum í 2024 kom millum annað av, at prísurin á brennievni lækkaði, meðan prísirnir á útfluttum vørum úr Føroyum vóru støðugir ella hækkandi. Tað merkir, at føroyska býtislutfallið batnaði í 2024. Harafturat var nógv alment og privat íløguvirksemi í 2024, sum eisini stimbraði búskapin, umframt at rentustøðið lækkaði í 2024.

Ein orsøk til, at vøksturin minkaði í 2024, var verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum í mai og juni mánaði. Virksemið minkaði í eitt tíðarskeið av verkfallinum, og tað sæst tí aftur í hagtølunum fyri 2024, hóast verkfallið ikki hevði varandi ávirkan á búskapin. Fleiri av hagtølunum geva tí helst ikki eina rætta mynd av árinum 2024, tí *grundvøksturin* (trendvøkstur) í búskapinum helst var størri, enn hagtølini geva fatan av.

Búskapurin vaks sambært fyribils metingum um 3% í 2024 í ársins prísum. Torført er at meta um, hvussu stórur vøksturin var í føstum prísum í 2024. Fíggjarmálaráðið roknar við, at BTÚ hækkar millum 4 og 5% bæði í  í 2025 og í 2026 (ársins prísir). Avgerandi fyri vøksturin í 2025 og 2026 verður gongdin í altjóða búskapinum. Afturat hesum fara prísvøksturin og gongdin í rentustøðinum at ávirka gongdina.

Uppgerðirnar av tjóðarroknskapinum í føstum prísum vísa, at búskaparvøksturin í Føroyum hevur verið nakað størri enn í hinum Norðurlondunum síðstu um 15 árini. Hetta er víst í mynd 2 niðanfyri, har londini byrja við sama vísitali 100 í 2008.

Trygdarpolitiska støðan í Evropa og geopolitiski ófriðurin millum heimsveldini eru óvissur, sum kunnu geva lægri vøkstur enn væntað. Hinvegin eru ætlanir um stórar almennar íløgur í Evropa,

millum annað í verjumál, tilbúgving, trygd og grøna orkuskiftið, sum eisini fara at stimbra búskapirnar í Evropa næstu 1-2 árini.

Prísvøksturin er minkaður síðani 2023, og reala inntøkan hjá flestu húsarhaldum er komin á aftur støðið, sum var undan russisku innrásina í Ukraina. Tað er greitt eftir stóru lønarhækkingarnar, sum eru avtalaðar á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum fyri 2024 og 2025. Harafturat er skattaumskipan samtykt, sum fer at hækka tøku inntøkuna hjá flestu húsarhaldum í 2025.

**Mynd 2| BTÚ í føstum prísum, býtt á lond 2008 = 100, 2008 til 2026, forsagnir og metingar eftir 2023**




Viðm.: Uppgerðirnar fyri árini 2024 til 2026 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarnum.
Kelda: Hagstovan, OECD (2025), Real GDP forecast (indicator) og Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, mars 2025, IMF og íslendski miðbankin.

Síðsta árið er prísurin á brent-olju lækkaður frá um 85 USD fyri fatið til nú um 75 USD fyri fatið. At døma eftir futures-prísum á olju kann roknast við, at prísurin á olju lækkar 5-10% til ársenda 2026.

Síðstu árini er munandi ískoyti til vøksturin komið frá privatum og almennum íløgum. Hugsandi er, at óvissan um útlitini næstu 1-2 árini og rentuhækkingarnar, sum vóru í 2022 og 2023, hava tálmað hugin hjá fyritøkum og húsarhaldum at gera stórar íløgur. Hinvegin hava rentulækkingar verið serliga í 2024, sum kunnu mótvirka hesum. Roknast kann framvegis við nógvum almennum og privatum íløgum næstu 1-2 árini.

Privata nýtslan er ikki vaksin stórvegis síðstu tvey árini, sum helst er komið av stóra prísvøkstrinum í 2022 og 2023. Av tí, at útlit eru til reallønarvøkstur í 2025 og 2026, roknar Fíggjarmálaráðið við, at eitt ávíst ískoyti verður til búskaparvøksturin frá privatari nýtslu í 2025 og í 2026. Hugsandi er eisini, at samtykta skattaumskipanin fer at stimbra privatu nýtsluna.

Flestu forsagnir benda á, at prísvøksturin verður støðugur ella lækkar nakað í 2025 og 2026. Væntanir eru um, at miðbankarnir í USA og Evropa fara at lækka leiðandi renturnar eina ella tvær ferðir í 2025, tó at útlit ikki eru til stórar rentulækkingar.

Tekin eru framvegis um fløskuhálsar í pørtum av búskapinum. Fløskuhálsarnir kunnu stimbra prís- og lønarvøksturin í samfelagnum. Fløskuhálsar síggjast á arbeiðsmarknaðinum, á bústaðamarknaðinum og í pørtum av byggivinnuni. Grundað á tørvin á arbeiðsmegi í nógvum vinnugreinum roknar Fíggjarmálaráðið framhaldandi við lágum arbeiðsloysi næstu 1-2 árini.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg, sammett við privata skuld í øðrum londum í vesturheiminum. Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum (brutto) kann metast til um 50% av BTÚ. Húsarhaldsskuldin í Danmark og Noregi er 85-90% av BTÚ, meðan hon er um 75% av BTÚ í Íslandi. Í ES er húsarhaldsskuldin í miðal um 55% av BTÚ.

Síðsta árið eru bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum vaksin um 7% (ikki íroknað realkredittlán úr Danmark), meðan bruttoútlán til vinnukundar eru minkað um 5% (mynd 3). Realkredittlánini til føroysk húsarhald eru minkað um 19% síðsta árið. Vøksturin í realkredittlánunum steðgaði miðskeiðis í 2022 (mynd 3B), tá ið rentustøðið byrjaði at hækka.

**Mynd 3| Inn- og útlán til húsarhald og vinnufeløg, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept-2013 til jan-2025**







Viðm.: Nettoinnlánini í *mynd B* eru innlán frá húsarhaldum frádrigin útlán til húsarhald í *mynd A*.
Kelda: Hagstovan.

Frá 2019 til 2022 vuksu realkredittlánini til føroysk húsarhald nógv, men rentuhækkingarnar á realkredittlánum síðstu tvey árini hava gjørt, at húsarhald í størri mun velja bankalán til fígging av bústøðum heldur enn realkredittlán (mynd 3B). Skiftið frá realkreditt- til bankalán er ein orsøk til stóra vøksturin í útlánunum frá føroyskum peningastovnum til føroysk húsarhald. Innlán hjá føroyskum húsarhaldum eru vaksin um 4% síðsta árið, og innlán hjá føroyskum vinnufyritøkum eru vaksin um 22% síðsta árið.

Sethúsaprísir eru hækkaðir støðugt síðstu árini. Tó hækkaðu teir ikki eins nógv í 2022 og 2023, tá ið rentustøðið hækkaði nógv. Sambært hagtølum frá Betri Banka hækkaði sethúsaprísir um 10% í 2024. Miðalprísurin á einum sethúsum í Tórshavn var um 4,2 mió. kr. í 2024, meðan hann var um 2,2 mió. kr. aðrastaðni. Sostatt kosta eini sethús í miðal nærum tað tvífalda í Tórshavn sum aðrastaðni. Útlit eru til hækkandi prísir á sethúsum og íbúðum næstu 1-2 árini orsakað av, at rentustøðið sannlíkt verður støðugt ella lækkar nakað, og at reallønin hækkar.

Síðani 2014 er útboðið av nýggjum bústøðum ikki vaksið í sama mun sum eftirspurningurin. Fólkatalið er vaksið við um 6.500 fólkum síðani 2014, meðan bygdar eru um 2.200 nýggjar búeindir sama tíðarskeið sambært tølunum frá SEV fyri nýíbindingar í elkervið (mynd 4). Um lagt

verður til grund, at um 2,8 fólk eru í hvørjum húski í miðal, røkka 2.200 búeindir til eini 6.000 fleiri fólk.[1]

**Mynd 4| Nýbygging av bústøðum um alt landið, nýíbindingar í elkervið hjá SEV, 1998 til 2024**




Viðm.: Myndin vísir nýíbindingar í elkervið hjá SEV um alt landið. Myndin fevnir um sethús, raðhús og íbúðir.
Kelda: Hagstovan.

Nógv virksemi er framvegis í byggivinnuni. Fleiri stórar byggiverkætlanir eru í gongd, og fleiri eru væntandi næstu árini. Roknast kann við, at tørvur verður á at byggja bústaðir næstu árini, bæði eigarabústaðir og leiguíbúðir, tí samansetingin av húskjum broytist støðugt. Sambært konjunkturvísitalinum hjá Hagstovuni siga fyritøkur í byggivinnuni frá, at eftirspurningurin er um miðal. Flestu fyritøkur í byggivinnuni rokna við at fáa størri tørv á arbeiðsmegi næsta árið.

### *Roknast kann við størri ískoyti til vøksturin frá útflutningsvinnunum í 2025 og 2026*

Fíggjarmálaráðið roknar við størri ískoyti til vøksturin frá útflutningsvinnunum í 2025 og aftur í 2026. Ískoytið frá uppsjóvarvinnuni minkar helst nakað næstu 1-2 árini. Hinvegin verður tøkan av aldum laksi mett at vaksa í 2025 og aftur í 2026.

Fleiri av føroysku kvotunum á fjarleiðunum minka í 2025. Toskakvotan í Barentshavinum minkar, og kvotan av norðhavssild minkar niður í helvt, og kvotan av makreli minkar eisini. Útlit eru eisini fyri, at útflutningurin av fiskamjøli, lýsi og fóðuri minkar í 2025, sum millum annað kemur av, at meira fiskamjøl fer til fóðurframleiðslu, tí framleiðslan av laksi er mett at vaksa í 2025 og 2026. Hinvegin er væntandi, at prísirnir á sild, makreli, toski og laksi kunnu hækka nakað í 2025 í miðal.

Roknað verður við, at tøkan av aldum laksi hækkar um 10% í 2025, og Fíggjarmálaráðið roknar við, at tøkan hækkar aftur í 2026. Prísirnir á aldum laksi eru lækkaðir munandi fyrstu mánaðirnar í 2025. Væntað verður, at altjóða útboðið av aldum laksi kann vaksa 5-6% í 2025, sum er væl størri vøkstur enn undanfarin ár.

Útlitini fyri toll- og handilsstríði ger tað torført at meta um prísgongdina á altjóða laksamarknaðinum. Í løtuni er ikki sannlíkt, at prísirnir á aldum laksi hækka munandi í 2025. Samanumtikið verður roknað við, at ískoytið til vøksturin frá alivinnuni veksur í 2025 og 2026, sum serliga kemur av størri tøkunøgdum.

[1] Sambært hagtølum frá Hagstovuni vóru í miðal 2,8 fólk í hvørjum húski í Føroyum í februar 2025 (fólkatal býtt við talinum av húskjum).

Síðstu árini eru stórar íløgur gjørdar í smoltstøðir og kryvjivirki, og næstu 1-2 árini verða eisini gjørdar stórar íløgur. Úrslitini av íløgunum síggjast í størri tøku, og at miðalstøddin á smoltum, sum verða sett út, er hækkað úr um 200 gramm í 2016 í um 450 gramm í 2024. Útbyggingarnar hava við sær, at framleiðslan av smolti á landi kann vaksa, at miðalstøddin á smoltum veksur til um 500 gramm, og at vakstrartíðin á sjónum er minkað úr um 18 mánaðir í 2014 í 12,8 mánaðir í 2024.

**Mynd 5| Tøka av aldum laksi og sílum í kruvdari vekt, býtt á ár, 1996 til 2024, meting fyri 2025**




* Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum.
Kelda: Hagstovan og Búskaparráðið.

Árliga tøkan av alilaksi var millum 60 og 78 tús. tons í kruvdari vekt frá 2012 til 2020. Í 2021 vaks tøkan til út við 95 tús. tons í kruvdari vekt. Síðani hevur tøkan verið um 90 tús. tons árliga. Mynd 5 omanfyri vísir tøku av aldum laksi síðani 1996 og mettu tøkuna í 2025.

Síðstu trý árini hava prísirnir á aldum laksi sveiggjað millum 6 og 12 EUR/kg sambært fishpool vísitalinum, sum sæst í mynd 6 niðanfyri. Miðalprísurin á fishpool vísitalinum var um 8,2 EUR/kg í 2024, og higartil í 2025 hevur miðalprísurin verið um 8 EUR/kg. Viðmerkjast skal, at vanliga eru prísirnir á aldum laksi hægst fyrsta ársfjórðing og síðani nakað lægri restina av árinum. Eisini skal havast í huga, at síðstu 3-4 árini, meðan prísirnir á aldum laksi hava verið høgir, eru aðrir kostnaðir eisini hækkaðir nógv, og hetta tíðarskeiðið er framleiðslukostnaðurin fyri hvørt kg. av aldum laksi eisini hækkaður munandi.

Sambært stovnsmetingum hjá Havstovuni síggjast ávís tekin um bata fyri toskastovnin á Landgrunninum, men stovnurin er enn mettur at vera undir vandamarkinum. Samanumtikið væntast toskastovnurin ikki at vaksa stórvegis næstu 1-2 árini, sum annars hevur verið væntað áður. Fíggjarmálaráðið metir samanumtikið ikki, at útlit eru til stórvegis ískoyti til búskaparvøksturin frá botnfiskaveiðini undir Føroyum næstu 1-2 árini.

**Mynd 6| Fishpool vísitalið í EUR/kg., býtt á vikur, 2017 til viku 12 í 2025**




Kelda: Fish Pool Index.

## *Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum er framvegis væl fyri. Við tað meinast, at at kalla einki arbeiðsloysi er, at løntakaratalið er methøgt, og annars at arbeiðsmegin er flytfør millum vinnugreinar og ymisk øki í landinum. Tó er trýstið á arbeiðsmarknaðin stórt í løtuni, og trot er á arbeiðsmegi í fleiri vinnugreinum. Til dømis er trot á faklærdari arbeiðsmegi, og handilsvinnuni og privatu tænastuvinnunum tørvar eisini meira arbeiðsmegi.

Trýstið á arbeiðsmarknaðin og aðrir fløskuhálsar í búskapinum forða fyri, at framleiðslan kann vaksa meira og stimbra prís- og lønarvøkstrinum. Arbeiðsloysið við ársskiftið 2024/25 var 1,3% av arbeiðsfjøldini (mynd 7A). Arbeiðsloysið vaks nakað í 2020 og 2021, tá ið korona ávirkaði, men arbeiðsloysið minkaði skjótt aftur, og arbeiðsloysið hevur verið um 1% síðstu um fýra árini (mynd 7). Harafturat er arbeiðsloysið javnt lágt um alt landið.

**Mynd 7| Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-2010 til feb-2025**




Kelda: Hagstovan.

Talið á starvsfólkum er eisini methøgt um 30 tús. (árstíðarjavnað). Talið av starvsfólkum vaks frá 2014 til 2020 (mynd 7B) til um 28 tús. starvsfólk. Talið av starvsfólkum lækkaði síðani til um 26

tús. í apríl 2020 orsakað av koronufarsóttini. Síðani er talið av starvsfólkum vaksið aftur til út við 30 tús. Nevnast kann, at persónar, sum eru sjálvstøðugt vinnurekandi, ella sum bara hava inntøku uttanlands, eru ikki íroknaðir í talið av starvsfólkum í mynd 7.

Mynd 8 niðanfyri vísir lønargjaldingar (megingongdina, trendlinjuna) samlað fyri allan búskapin og fyri fimm høvuðsvinnugreinar. Av høvuðsvinnugreinunum er byggivinnan vaksin mest síðani ársbyrjan 2010.

**Mynd 8| Lønargjaldingar, trendur, býttar á mánaðir, jan. 2010 til febr. 2025**




Viðm.: Mynd A vísir samlaðar lønargjaldingar, trend, tilsamans jan. 2010 til febr. 2025.
Mynd B vísir lønargjaldingar, trend, í fimm høvuðsvinnugreinum jan. 2010 til febr. 2025. Vísital jan. 2010 = 100.
Kelda: Hagstovan.

Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar í samlaða búskapinum um 5% í 2024, sí talvu 1. Síðsta árið eru lønargjaldingarnar vaksnar mest innan heilsu- og almannaverk, røkt og umsorgan, sum óivað kemur av lønarhækkingum og lønarlyfti, sum starvsbólkar á umsorganarøkinum fingu í 2024. Ein onnur orsøk til munin á vøkstrinum í lønargjaldingum millum privatu vinnuna og tað almenna í 2024 kann eisini vera verkfallið í mai og juni 2024. Í byggivinnuni vuksu lønargjaldingarnar um 3% frá mars 2024 til februar 2025, sum er minni vøkstur enn undanfarin ár.

**Talva 1| Lønargjaldingar í samlaða búskapinum, 2021-2024, mió. kr.**

| Mia. kr. | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | *Broyting í 2024 í %* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnan | 6,7 | 6,9 | 7,4 | 7,8 | 8,1 | *3,9%* |
| Tað almenna | 3,7 | 3,9 | 4,1 | 4,3 | 4,7 | *9,3%* |
| Samlaði Búskapurin | 10,4 | 10,8 | 11,5 | 12,1 | 12,7 | *5,0%* |
| **Árligur vøkstur í lønargjaldingum í %** | **2,0%** | **3,7%** | **6,1%** | **5,8%** | **5,0%** | - |

Kelda: Hagstovan.

*Eftirspurningur og brúkaraprísir*

Síðstu 3-4 árini hevur ikki verið stórvegis vøkstur í privata eftirspurninginum. Størstu orsakirnar eru helst prísvøksturin og rentuhækkingarnar, sum ávirkaðu 2022 og 2023. Væntast kann, at óvissan um útlitini næstu 1-2 árini og um trygdarpolitisku støðuna í Evropa fara at tálma vøkstrinum í privata eftirspurninginum næstu tíðina.

Fíggjarmálaráðið roknar við lítlum og hóvligum vøkstri í privatu nýtsluni næstu 1-2 árini. Lønarhækkingar, hægri reallønir, møguliga rentulækkingar og lítil skuld tala fyri, at privata nýtslan kann hækka nakað næstu 1-2 árini. Roknað verður við, at privata nýtslan fer at geva eitt lítið ískoyti til vøksturin í BTÚ næstu 1-2 árini. Metingin tekur hædd fyri, at prísvøksturin er minkaður, og at hann væntast at vera lágur næstu 1-2 árini.

Lutfalsliga stórar lønarhækkingar eru avtalaðar á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum fyri 2025, sum fara at hava við sær hægri reallønir og meira tiltøkupening fyri flestu húsarhald. Aftrat hesum kemur samtykta skattaumskipanin, sum fer at hava somu ávirkan.

Innlendis eftirspurningurin í Føroyum vaks annars í tíðini við koronu í 2020 og 2021, tá ið ikki í sama mun bar til at eftirspyrja vørur og tænastur uttanfyri Føroyar. Hagtøl yvir nýtslu av gjaldskortum síðstu árini frá Betri Banka og Føroya Banka benda á, at um 30% av nýtsluni við gjaldskortum hjá føroyingum fer fram uttan fyri Føroyar. Somu hagtøl benda eisini á, at talið var um 15% í 2020, sum var nógv ávirkað av koronu. Víst verður til mynd 2.2 í várfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum í 2025.

Innflutningurin til húsarhaldsnýtslu er ikki vaksin nógv í virði síðstu trý árini, um hugsað verður um prísvøksturin síðani 2022. Tað bendir á, at húsarhald hava tillagað sína nýtslu til prísvøksturin, sum hevur verið síðstu árini. Húsarhald keypa tí heldur bíligari vørur og hava skorið ymiskt burtur av nýtsluni, sum lætt bar til at skera burtur.

Á mynd 9, sum vísir hagtøl yvir smásølu í føstum prísum fyri tveir ymiskar vørubólkar, sæst, at privati eftirspurningurin hækkaði í 2020 og 2021 undir koronu og er síðani lækkaður aftur. Smásøla er søla hjá handlum til privata nýtslu og lýsir gongdina í umsetninginum og broytingar í seldum mongdum. Myndin vísir, at privati eftirspurningurin helst lækkaði nakað í 2023 og 2024.

**Mynd 9| Smásøla í føstum prísum, býtt á vørubólkar og ársfjórðingar (trendur), 2005 = 100, 2005 til 2024**




Kelda: Hagstovan.

Tó eigur at verða nevnt, at ein orsøk til, at størri vøkstur ikki sæst í privata eftirspurninginum, til dømis í hagtølum yvir innflutning og smásølu, kann vera verkfallið í mai og juni 2024. Tí er hugsandi, at *veruligi* eftirspurningurin og nýtslan vóru nakað hægri í 2024, enn hagtølini geva fatan av.

Sambært konjunkturkanningini frá Hagstovuni í januar 2025 er vísitalið fyri brúkaravæntanir ikki broytt stórvegis síðani í juni 2022 (mynd 10B). Flestu húsarhald rokna við, at teirra fíggjarstøða og búskaparstøðan í Føroyum verða at kalla óbroytt ella versna nakað næsta árið. Mynd 10 vísir samanvigaða vísitalið og vísitalið fyri húsarhald, handilsvinnuna og tænastuvinnuna. Samanvigaða konjunkturvísitalið fyri vinnu og húsarhald hækkaði frá -8 til 9 í síðstu konjunkturkanningini (mynd 10A).

Konjunkturvísitalið fyri handilsvinnuna og tænastuvinnuna hækkaðu bæði í síðstu kanning, sum millum annað kemur av, at tær báðar vinnurnar vænta, at søla og eftirspurningur fara at vaksa nakað næsta árið. Gongdin er víst í myndunum 10C og 10D. Á mynd 10C sæst eisini, at handilsvinnan væntar hækkandi sølu og eftirspurning næsta árið.

Nevnast kann, at verkfallið í mai og juni 2024 kann hava ávirkað konjunkturvísitalið miðskeiðis í 2024. Á mynd 10 sæst ein ávís lækking í samlaða vísitalinum og í vísitalinum fyri handilsvinnuna og fyri tænastuvinnuna miðskeiðis í 2024.

**Mynd 10| Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan-2006 til jan-2025**




Kelda: Hagstovan.

Brúkaraprístalið var rættiliga støðugt frá 2009 til 2021, men seinna hálvár 2021 hækkaði prístalið nógv, og prísvøksturin tók dik á seg í 2022. Seinna hálvár 2023 minkaði prísvøksturin og er nú

komin aftur á eitt vanligt støði á um 2% um árið. Ársmiðal prísvøksturin var um 2% í 2024. Brúkarapríistalið er víst í mynd 11 niðanfyri.

**Mynd 11| Brúkarapríistalið, 1. ársfjórðing 2001 til 4. ársfjórðing 2024, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

Týdningurin av brennievni í føroyska innflutninginum er stórur, tí síðstu árini hevur um 15% av innflutninginum verið brennievni og tílíkt. Rentustøðið hevur eisini stóra ávirkan á gongdina í brúkaraprísum og serliga á kostnaðin av at eiga ella leiga sær bústað, og gongdin í rentustøðinum síðstu trý árini sæst eisini beinleiðis aftur í brúkarapríistalinum.

### *Gongdin í til- og fráflyting*

Nettotilflyting er framvegis til landið, tó at hon er minkað munandi síðani tíðliga í 2022. Tilflytingin netto var 4-500 fólk árliga frá 2017 til 2022. Síðstu trý árini er tilflytingin netto minkað til um 200 fólk árliga (mynd 12). Harafturat er tilflytingin broytt soleiðis, at nettofráflyting er av ríkisborgarum, meðan tilflyting er av útlendskari arbeiðsmegi.

**Mynd 12| Nettoflyting til Føroyar, 12 mánaðir samanlagt, til- og fráflyting, jan-2007 til jan-2025**




Viðm.: Grønu og reyðu stabbarnir vísa ávikavist til- og fráflyting hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Gongdin við nettotilflyting og fólkavøkstri, sum byrjaði í 2014, broyttist sostatt í 2022. Burðaravlopið var at kalla óbroytt í 2024, sammett við í 2023. Bæði talið av føddum og deyðum hækkaði í 2024. Tilflytingin er síðstu tvey árini minkað úr 1.900 til 1.500 fólk, meðan fráflytingin hevur verið støðug á um 1.400 fólk.

**Mynd 13| Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2024**




Kelda: Hagstovan.

At tilflyting netto framvegis er til landið er tekin um, at arbeiðsmarknaðurin er væl fyri, og at fleiri størv hava tikið seg upp í landinum. Nettotilflytingin, býtt á mánaðir og ár, er víst í myndunum 12 og 13.

**Mynd 14| Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985-2025**




Kelda: Hagstovan.

Á mynd 14 omanfyri sæst, at fólkatalið í Føroyum nærkast 55 tús. (sí eisini talvu 3). Myndin vísir eisini, at fólkatalið ikki hækkaði stórvegis tey um 10 árini frá 2003 til 2014. Síðani 2014 hevur verið fólkavøkstur, tó at hann er minkaður aftur síðani 2022. Minkingin í nettotilflytingini og í fólkavøkstrinum síðstu tvey árini eru áminningar um, at fráflyting og fólkaminking kunnu taka seg uppaftur, eins og støðan var árini 2003 til 2014.

**Talva 2| Fólkatalið býtt á aldursbólkar og ár, ársbyrjan, 2020 til 2025**

| Aldursbólkur/ár Fólkatal | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | Broyting í % frá 2020 til 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 00 til 15 | 11.603 | 11.698 | 11.786 | 11.809 | 11.748 | 11.669 | 0,6% |
| 16 til 66 | 32.382 | 32.804 | 33.230 | 33.587 | 33.814 | 33.969 | 4,9% |
| 67+ ár | 8.094 | 8.332 | 8.491 | 8.630 | 8.814 | 9.002 | 11,2% |
| **Tilsamans** | **52.079** | **52.834** | **53.507** | **54.026** | **54.376** | **54.640** | **4,9%** |

Kelda: Hagstovan.

Talva 2 vísir, at síðani ár 2020 hevur størsti parturin av fólkavøkstrinum verið í aldursbólkinum omanfyri 67 ár og eldri. Hóast nettotilflyting enn er til landið, vísa framrokningar greitt, at aldurs- og fólkasamansetingin fer at broytast næstu árini, soleiðis at lutfalsliga færri fólk verða í aldursbólkinum 16 til 66 ár, í mun til talið í aldursbólkinum 67 ár og eldri. Tað er eisini orsakin til, at stórar avbjóðingar eru við haldførinum í almenna búskapinum og fólkatalið helst fer at hækka nakað næstu árini.

**Talva 3| Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. feb. 2024 til 1. feb. 2025**

| Øki í landinum | Fólkatal 1. feb. 2024 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. feb. 2025 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya øki | 6.449 | 16 | -10 | 6.455 | 6 | 0,1 |
| Eysturoyar øki | 12.490 | 64 | 84 | 12.638 | 148 | 1,2 |
| Tórshavnar økið | 21.236 | 58 | 92 | 21.386 | 150 | 0,7 |
| Streymoyarøkið annars | 4.943 | 13 | -24 | 4.932 | -11 | -0,2 |
| Vága øki | 3.428 | 12 | 16 | 3.456 | 28 | 0,8 |
| Sandoyar øki | 1.283 | -11 | 40 | 1.312 | 29 | 2,3 |
| Suðuroyar øki | 4.585 | -5 | -18 | 4.562 | -23 | -0,5 |
| **Alt landið** | **54.414** | **147** | **180** | **54.741** | **327** | **0,6** |

Viðm.: Tórshavnar økið er í hesum føri Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

Størsti parturin av fólkavøkstrinum síðstu árini hevur verið í miðøkinum í landinum og serstakliga í høvuðsstaðarøkinum og í Eysturoynni. Ein broyting síðstu trý árini hevur verið, at nú er stór tilflyting netto til Sandoynna. Broytingin er óivað komin av útbyggingunum av

samferðslukervinum. Í mynd 15 er vístur fólkavøksturin í % síðstu 5 árini. Í talvu 3 síggjast broytingar í fólkatalinum síðstu 12 mánaðirnar, býtt á høvuðsøki.

**Mynd 15| Broyting í fólkatali í % frá 1. jan. 2020 til 1. feb. 2025 tilsamans, býtt á øki í landinum**




Kelda: Hagstovan.

## *Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni*

Gongdin á handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini er merkt av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað. Tó er okkurt árið, har ið býtislutfallið helst er versnað. Síðani 2022 eru prísir á bæði útflutnings- og innflutningsvørum hækkaðir munandi. Í miðal eru prísirnir á vørum, sum verða útfluttar úr Føroyum, tó helst hækkaðir meira enn prísirnir á innfluttum vørum.

**Mynd 16| Innflutningur og útflutningur av vørum, mió. kr., 1988 til 2024**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við í uppgerðini av handilsjavnanum.
Kelda: Hagstovan.

Avlop hava verið á handilsjavnanum síðani 2013. Í 2022 hækkaðu bæði útflutningur og innflutningur munandi, millum annað orsakað av prísvøkstri. Síðani 2022 hevur útflutningurin í virði verið at kalla óbroyttur, meðan innflutningurin minkaði í 2023 og aftur í 2024, mynd 16. Innflutningurin minkaði í 2023 og 2024 serliga av lækkandi oljuprísum. Roknast kann við, at avlop eisini verður á handilsjavnanum í 2025.

**Mynd 17| Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998 til 2024**




* Talið fyri 2024 er meting og skal lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Myndirnar 16 og 17 vísa gongdina í handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini. Handilsjavnin fevnir um vøruhandil við útlond; tænastuveitingar til og frá útlondum eru sostatt ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*. Uppgerðir hjá Hagstovuni av tænastujavnanum benda á, at Føroyar hava hall á tænastujavnanum við útlond á út við eina mia. kr. árliga, tó at óvissa er um uppgerðina.

Handilsjavnin sveiggjar nógv frá ári til ár, alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutningsvirðinum á fiski og aldum laksi. Eins og víst í mynd 16, er føroyski útflutningurin vaksin frá um 7 mia. kr. í 2015 til um 12,5 mia. kr. í 2024. Útflutningurin er sostatt út við tvífaldaður síðani 2015 í ársins prísum.

## Heimsbúskapurin

Óvissa er um útlitini fyri búskaparvøkstri í 2025 og 2026. Óvissan kemur serliga av, at hægri tollforðingar og møguliga handilsstríð sannlíkt vera millum heimsveldini næstu árini. Verða hægri tollforðingar ásettar, og handilsstríð næstu árini millum heimsveldini, fer tað at darva búskaparvøkstrinum og stimbra prísvøkstrinum í vesturheiminum.

Talva 4 vísir metingar og forsagnir hjá OECD um búskaparvøkstur í 2025 og 2026. Roknast kann við, at heimsbúskapurin veksur um 3% í 2025 og í 2026. Búskapurin í Evropa vaks sambært metingum um 0,7% í 2024 og veksur væntandi um 1% í 2025 og í 2026. Í USA kann roknast við búskaparvøkstri á um 2% í 2025 og um 1,5% í 2026.

**Talva 4| Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2021-2026, býtt á lond og øki**

| *% um árið í føstum prísum** | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| USA | 6,1 | 2,5 | 2,9 | 2,8 | 2,2 | 1,6 |
| Evruøkið | 6,3 | 3,5 | 0,4 | 0,7 | 1,0 | 1,2 |
| Týskland | 3,7 | 1,4 | -0,3 | -0,2 | 0,4 | 1,1 |
| Bretland | 8,6 | 4,8 | 0,4 | 0,9 | 1,4 | 1,2 |
| Danmark | 7,4 | 1,5 | 2,5 | 3,6 | 3,6 | 2,3 |
| Heimsbúskapurin | 6,6 | 3,6 | 3,3 | 3,2 | 3,1 | 3,0 |

* Uppgerðirnar fyri árini 2024 til 2026 eru fyribils metingar og forsagnir.
Kelda: OECD Economic Outlook, Interim Report, Steering through Uncertainty, mars 2025, IMF World Economic Outlook, oktober 2024. Tølini fyri Danmark í 2025 og 2026 eru metingar og forsagnir hjá danska Tjóðbankanum, Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, 19. mars 2025.

Í flestu av londunum í Evropa var lítil og hóvligur búskaparvøkstur í 2024, og roknað verður eisini við hóvligum búskaparvøkstri næstu 1-2 árini. Tó verður roknað við stórum búskaparvøkstri í Danmark í 2025 á væl omanfyri 3%. Búskapurin í Danmark er í einari serstøðu, og vøksturin kemur í stóran mun kemur av útflutningi av heilivági, millum annað til USA.

Neyðugt er at leggja aftrat, at forsagnirnar í talvu 4 byggja á handilspolitikkin, sum er samtyktur í USA og Evropa fram til hálvan mars í ár. Verða fleiri og størri tollforðingar ásettar, fer hetta at tálma búskaparvøkstrinum og stimbra prísvøkstri samsvarandi.

Prísvøksturin er minkaður av rentuhækkingunum, sum vóru í USA og Evropa í 2022 og 2023. Síðsta hálva árið er prísvøksturin tó minkaður minni, enn flestu forsagnir hava bent á. Serliga í tænastuvinnunum hevur prísvøksturin verið hægri enn væntað síðstu mánaðirnar. Væntanir eru nú um, at prísvøksturin verður verandi á áleið sama støði á millum 2 og 2,5% í 2025 og 2026.

Vøksturin, sum er væntaður í USA og í londunum í Evropa næstu 1-2 árini, kemur serliga av reallønarvøkstri og av, at arbeiðsmarknaðirnir sum heild eru væl fyri, og av vøkstri í tænastuvinnunum í fleiri londum. Hinvegin verður vøksturin darvaður av, at stígur er komin í vøksturin í ídnaðarframleiðsluni, at produktivitetsvøksturin er lágur og av demografisku broytingunum í fólkasamansetingini.

Roknast kann eisini við, at óvissan um møguligar tollforðingar, handilsstríð og geopolitiska óvissan fara at tálma privatu nýtsluni og privatu íløgunum næstu 1-2 árini. Prísvøkstur og óvissa um útlitini ávirka framvegis húsarhald og vinnulív serliga í Evropa. Roknað verður við avmarkaðum vøkstri í privatu nýtsluni og í privatu íløgunum næstu 1-2 árini.

Almenni fíggjarpolitikkurin í Evropa fer sannlíkt at stimbra búskapirnar næstu 1-2 árini orsakað av stóru íløgunum í verju, trygd, tilbúgving og grøna orkuskiftið. Tó er torført at meta um tað enn, tí ætlanirnar eru ikki vorðnar almennar. Tekin eru eisini um, at almenni fíggjarpolitikkurin í USA verður meira stimbrandi næstu 1-2 árini.

Forsagnir benda á, at prísvøksturin í Evropa verður millum 2 og 2,5% í miðal í 2025 og í 2026. Roknað verður við áleið sama prísvøkstri í USA næstu 1-2 árini. Prísvøksturin er millum annað minkaður orsakað av lægri prísum á orku og brennievni. Prísvøksturin á tænastuveitingum er hinvegin ikki minkaður í sama mun. Sostatt er prísvøksturin áleið á tí støðinum, sum miðbankar vanliga halda vera hóskandi prísvøkstur.

Flestu forsagnir benda á, at miðbankarnir í USA og Evropa fara at lækka leiðandi renturnar eina ella tvær ferðir í 2025, og at leiðandi renturnar síðani verða støðugar ella verða lækkaðar nakrar fáar ferðir í 2026 (mynd 18).

**Mynd 18| Leiðandi rentur, býtt á lond, øki og ársfjórðingar, 2022 til 2026, forsøgn til ársenda 2026**




Kelda: OECD Economic Outlook, Interim Report, Steering through Uncertainty, mars 2025.

## Almenn fíggjarmál

Her verður hugt stutt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og kommunum síðstu árini. Mynd 19 niðanfyri vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslitinum síðani 1997 við mettum tølum fyri 2024, fíggjarlógartølum fyri 2025 og tølum fyri árini 2026-30 úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar fyri fíggjarárið 2026.

Landskassin hevði avlop frá 2016 til 2022, tó ikki í 2020, tá ið korona ávirkaði búskapin. Í 2023 var síðani hall í landskassanum á um 215 mió. kr. Úrslitið hjá landskassanum fyri 2024 er ikki endaliga gjørt upp enn, men Fíggjarmálaráðið metir, at úrslitið hjá landskassanum var um 100 mió. kr. í halli í 2024. Hallið í samtyktu fíggjarlógini fyri 2025 er um 120 mió. kr., men Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin fer at hava hall á um 250 mió. kr. í 2025, tá ið hædd er tikin fyri framfluttum løgujáttanum, hægri inntøkum og eykajáttanum, sum roknast kann við.

Árini fram til 2022 vóru inntøkurnar hjá landinum frá skattum og avgjøldum størri enn væntað í samtyktu fíggjarlógunum. Síðani 2023 hevur støðan kortini verið hon, at inntøkurnar hava verið lægri enn mettar í samtyktu fíggjarlógunum. Orsakirnar hava millum annað verið, at búskapar- og fólkavøksturin er minkaður, at privata nýtslan er vaksin minni enn væntað, umframt at oljuprísir eru lækkaðir síðani 2022. Lægri oljuprísir ávirka inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldinum.

Inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini, meðan útreiðslurnar hækka meira støðugt og broytast ikki í sama mun frá ári til árs. Í 2023 og 2024 vuksu útreiðslurnar hjá

landinum meira enn inntøkurnar, millum annað orsakað av óvanliga nógvum íløguvirksemi hjá landinum í 2023, av at búskaparvøksturin er minkaður, og at privata nýtslan er vaksin minni enn væntað. Tí hevur verið hall í landskassanum síðani 2023, og roknað verður eisini við halli í landskassanum í 2025 og 2026.

**Mynd 19| Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2024, játtanar- og ætlanartøl fyri 2025 til 2030**




Viðm.: Tølini fram til 2023 eru roknskapartøl. Hallið í 2024 verður mett til um 100 mió. kr. Tølini fyri 2025 eru mett tøl, og tølini fyri 2026 til 2030 eru úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar, sum eru íroknað átøkini at betra úrslitið og flytingar í Búskapargrunnin.
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið.

Búskaparvøksturin minkaði í 2024, og tað sæst aftur sum lægri vøkstur í inntøkunum hjá landinum. Eisini tykist stígur vera komin í vøksturin í privatu nýtsluni, sum hevur ávirkað inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldinum í 2023 og í 2024.

Inntøkurnar hjá landinum hækkaðu um 3% í 2023 og um 2% í 2024, sum er munandi lægri enn árini frammanundan. Samlaðu útreiðslurnar hjá landinum íroknað løguútreiðslur hækkaðu um 9% í 2023 og um 2% í 2024. Her eigur at verða nevnt, at høgi vøksturin í samlaðu útreiðslunum hjá landinum í 2023 í stóran mun kom av óvanliga nógvum løguútreiðslum hjá landinum í 2023.

Kommunurnar hava tilsamans havt hall síðani 2018. Sosialu grunnarnir hava hinvegin havt avlop samanlagt síðstu nógvu árini á 2-300 mió. kr. árliga. Úrslitini hjá kommununum fyri 2024 eru ikki endaliga gjørd upp enn, men sannlíkt høvdu kommunurnar hall í 2024 á tilsamans millum 250 og 300 mió. kr. Úrslitið hjá tí almenna tilsamans í 2024 var helst eitt hall á 150-200 mió. kr., ella um 0,5% av BTÚ.

Mynd 20 vísir gongdina í langfreistaðu skuldini (brutto) og gjaldførið hjá landinum. Árini frá 2008 til 2014 vaks skuldin orsakað av, at landskassin hevði hall tey árini. Føroyski búskapurin vaks kortini somikið nógv tey árini, at skuldin vaks ikki stórvegis sum partur av BTÚ. Síðani 2023 hevur aftur verið hall í landskassanum, sum hevur givið vaksandi landskassaskuld. Av tí at BTÚ væntast at vaksa um eina mia. kr. árliga næstu árini, og av tí at hallið í landskassanum er avmarkað, veksur skuldin kortini ikki stórvegis sum partur av BTÚ.

**Mynd 20| Langfreistaða skuld landskassans og gjaldføri landskassans í mió. kr., 1997 til 2025**




Viðm.: Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Gjaldføri landskassans fevnir í hesari uppgerðini um virðisbrøv og innistandandi hjá landskassanum.
Kelda: Gjaldstovan, Landsbankin og Fíggjarmálaráðið.

Orsakin til, at skuldini hjá landinum vaks nógv í 2017, er lánið hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar, sum verður talt við sum skuld hjá landinum. Tunnilsfelagið tók lánið síðst í 2016.

Lánið verður íroknað landskassaskuldina frá 2017, tí landið veðheldur fyri lánið og rindar í løtuni eina upphædd árliga til felagið sum partur av veðhaldsskylduni. Í løtuni er P/F Eystur- og Sandoyartunlar ikki sjálvberandi og ikki ført fyri at rinda alla skuldina aftur við egnum inntøkum. Tí verður skuldin hjá felagnum tald við í skuldina hjá landinum sambært altjóða meginreglum um uppgerð av almennari skuld eigur skuldin.

Tað almenna í Føroyum er ikki serstakliga skuldarbundið, um sammett verður við onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 18% av BTÚ, og kommunurnar hava bruttoskuld á um 1,8 mia. kr. ella um 6% av BTÚ (íroknað skuld hjá IRF). Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur harafturat skuld á um 2,3 mia. kr., ella um 8% av BTÚ, sum landið hevur veðhildið fyri.

Tað gevur tilsamans eina almenna bruttoskuld á um 33% av BTÚ, sum er nakað hægri enn skuldin brutto í Danmark, sum verður mett til 25-30% av BTÚ. Almenna bruttoskuldin í londunum í Evropa er til sammetingar um 90% av BTÚ í miðal. Almenna bruttoskuldin í Íslandi er mett til um 55% av BTÚ. Viðmerkjast skal, at bruttoskuldin í Evropa væntast at hækka munandi sum partur av BTÚ næstu 5-10 árini orsakað av hægri útreiðslum til og íløgum í verjumál.

Fyri haldførið í almenna búskapinum er avgerandi, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki hækkar skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini.

Búskaparráðið hevur síðstu árini mett um langtíðarhaldførið í almenna búskapinum. Í nýggjastu metingini av haldførinum er nevnt, at stórar haldførisavbjóðingar framvegis eru í almenna geiranum, og at tær serliga stava frá broyttari fólkasamanseting, sum framrokningar av fólkatali og aldurssamanseting vísa vera í framtíðini.

**Mynd 21| Nettoskuld landskassans (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri) í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2025**




Viðm.: Nettoskuld er í myndini víst sum langfreistaða skuldin hjá landskassanum frádrigið gjaldførið hjá landskassanum.
Gjaldføri landskassans fevnir í hesari uppgerðini um virðisbrøv og innistandandi hjá landskassanum.
Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Kelda: Landsbankin.

Ein broyting, sum er farin fram viðvíkjandi skuldini hjá landinum, er, at rentustøðið á skuldini er hækkað munandi og eisini væntast at hækka nakað aftrat, so hvørt sum skuldin verður endurfíggjað. Við verandi rentuforsagnum verður mett, at landskassin fer at rinda um 160 mió. kr. í rentuútreiðslum brutto í 2026.

Tá ið rentustøðið hækkar, kostar tað landi og kommunum pening í hægri rentuútreiðslum. Lánsbrævaskuldin hjá landinum er í løtuni um 5,3 mia. kr., og gjaldføri landsins er um 4,9 mia. kr. Nettoskuldin er sostatt um 400 mió. kr. umframt skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Gongdin í nettoskuldini hjá landskassanum er víst í mynd 21.